Tøma fjósi› í Fámara

Flutningsvi›urskiftini til og úr Fámara eru so miki› vánalig, at avgjørt er at tøma fjósi›

EDVARD JOENSEN

Fámara: Neytini vór›u í gjár flutt úr fjósinum í Fámara til onnur fjós í Su›uroynni. Tey flestu fóru til Sumbiar og nøkur til Øravíkar.

Umstø›urnar í Fámara eru vor›nar so truplar, at Jar›arrá›i› heldur ikki vera rá›iligt at fara undir enn ein vetur vi› neytum í Fámara.

Leygardagin skriva›i Sosialurin, at vegurin til Fámara var so miki› vánaligur, at Strandfer›slan ikki metti ta› rá›iligt at senda stóra mjólkarbilin eftir mjólkini í Fámara.

Hetta er ein grund til, sigur Jóannes Dalsgar›, stjóri á Føroya Jar›arrá›, at avgjørt er at flyta neytini. Tann ringi vegurin ger ta› samstundis tvørligt at flyta fó›ur til Fámara, og ta› ber so als ikki til at hava neytini standandi svong í fjósinum. So tann grundin vigar rættiliga tungt, tá nú er avgjørt at flyta neytini burtur.

Neytini í Fámara ver›a nú flutt til Sumbiar og Øravíkar

Mynd: Edvard Joensen

Ein tri›ja grund undir avger›ini er, sigur stjórin á Jar›arrá›num, at bygningar í Fámara eru í ringum standi og krevja umfatandi ábøtur. Ta› skal helst gerast, á›renn - ella um - nakar festari fæst at taka vi› aftur.

Í fjósinum í Fámara vóru 15 neyt. 12 mjólkik‡r og tríggjar, sum ikki mjólka. Umframt hoyrir hagi, sum ber 60 sey›ir, til festi›.

Neytini í Fámara ver›a flutt til eitt spildurn‡tt fjós í Sumba og eitt fjós í Øravík, uppl‡sa keldur, Sosialurin hevur tosa› vi› í Su›uroy.

Bóndin í Sumba fær tey neyt, hann hevur brúk og pláss fyri at h‡sa. Í n‡ggja fjósinum eru bæ›i básar og krubbur, har neytini kunnu ganga leys. Framman undan hevur hann seks mjólkik‡r og sjey kvidnar kvígur. Men hann hevur pláss fyri væl fleiri kríatúrum. Hvussu nógv hann tekur úr Fámara velst um, hvørjum standi neytini eru í.

Sumbiarbóndin fekk frábo›an fríggjadagin um, at neytini í Fámara skuldu flytast, og at hann kundi fáa ta›, honum tørva›i til at fylla fjósi›. Hvussu ver›ur vi› keypi, ver›ur avgjørt seinni.

Jóannes Dalsgar›, stjóri á Jar›arrá›num, sigur, at enn er einki avgjørt, hvussu ver›ur vi› festinum í Fámara. Hvørki um ta› ver›ur ni›urlagt, ella um n‡ggjur festari ver›ur settur.

Taka nú ve›rarnar aftur

Hóast gamalt er at taka ve›rar á mikkjalsmessu, eru stø› í landinum, har ney›ugt er at fara eftir teimum, me›an líkindi eru

EDVARD JOENSEN

Slættanes: Teir standa bundnir at rættargar›inum á lendingini á Slættanesi. Fimtan hornasey›ir, sum tiknir eru úr Vestaru Skor og nú skulu til Sandavágs. Menninir sita ni›an fyri og fá sær ein bita. Onkur, sum hevur veri› so hyggin at hava skiftiklæ›ir vi›, dregur sær turt upp á kroppin, tí ta› regna›i alla tí›ina, me›an menn vóru inni í skorini.

Í vár var Tí›indabla›i› Sosialurin vi›, tá sandavágsmenn vóru í Vestaru Skor vi› hornasey›i. Og vitiligt er, at tá fari› var› vi› at sleppa út, ver›ur eisini bo›a› at koma eftir teimum aftur.

Avgjørt var› at fara seinasta vikuskifti. Begynt var› fríggjamorgunin, men menn vanda›u ve›ur og settust aftur. Fari› var› so leygardagin í sta›in. Ve›ri› helt sær, til komi› var í Skoradal og farast skuldi inn í Skorarnar. Tá fór at regna, og ta› regna›i líka til allir vóru komnir aftur til Steinin í Skoradali vi› teimum sey›unum, sum eftir vóru í Skorini.

Seytjan vór›u sleptir í Vestaru Skor í vár, og hendan dagin, fari› var› eftir teimum, vóru fimtan eftir. Hvat er vor›i› av hinum bá›um, ver›ur so bara gitt um. Onkur heldur, at teir munnu vera omandotnir. Ta› kann vera rættiliga sannlíkt. Men onkur er, sum uggar seg vi›, at ta› er hent fyrr, at onkur er sloppin úr Skorini, hóast hegna› hevur veri› fyri, og er afturkomin úr haganum, tá fjøllini vóru gingin um heysti›. So til ta› er yvirsta›i›, er bara at liva í vónini.

Mynd: Edvard Joensen

Komi› er upp úr Skorini, og hvílt ver›ur á Skoradali

Ta› eru ikki bara sandavágsmenn, sum hava sey› gangandi í skorunum nor›anfyri. Gitin er Ryggsskor hjá mi›vingum frá sjónvarpssending fyrst í nítiárunum.

Umframt hava menn sey› gangandi a›rasta›ni í ur›um og torvum fram vi› vágalandinum fyri nor›an.

Fríggjadagin vóru sandavágsmenn í Torvuni, teir kalla, innanvert Trøllkonufingur, har teir høvdu tveir sey›ir gangandi. Teir vór›u flettir sama kvøldi›. Annar vá 58 pund, me›an hin vá 78.

Sey›irnir úr Vestaru Skor vór›u sleptir á beiti heima í bønum, til mett ve›rur rá›iligt at fletta teir.

– Eingin grund er at fó›ra ma›kar vi› so gó›um kjøti, var› tiki› til, tá komi› var› aftur at húsum leygardagin.

Í seinni bla› ver›ur myndafrásøgn frá túrinum.

Luksusbilar við smáum prísum...

Júst nú er tann nýggi Nubira Stationcar heimkomin - og teir italsku designararnir hava gjørt tað aftur. Nubira er nú flottari enn nakrantíð.

Útsjóndin er ikki tað einasta góða við Nubira. Bilurin er á tremur av hentari útgerð m.a. sentrallás, servostýring, el-rútar, eldrivin/hitaði síðuspegl, tónaðir rútar og viðlitaðir kúfangarar. Nubira Stationcar hevur harafturat eitt av størstu viðførisrúmum í mun til aðrar bilar í sama flokki (1.840 litrar við niðurløgdum setrum).

Sjálvandi fylgir 3 ára verksmiðjugaranti/100.000 km og 6 ára rustgaranti við Daewoo bilinum.

Komið inn á gólvið hjá Esmari Simonsen á Kambsdali og royn Nubira.

Nubira Stationcar úr bert 168.700 kr. Nubira Sedan úr bert 158.700 kr.

Vælkomin!

Matiz er ein fittur og handligur 5-hurða mini MPV við sentrallás, el-rútar og servostýring.
Úr 99.985,-

Lanos 1,3 ella 1,5.
Rúmligur og fjølbroyttur.
(í klassa viðToyota Corolla).
Úr 119.985,-

DAEWOO GARANTI 3ár ELLA 100.000 KM 6ár MÓTI RUSTI

Nubira Stationcar úr bert
168.700,-
Sum sedan úr 158.700,-

DAEWOO
- ein skilagóð avgerð!

P/f Esmar Simonsen
Tel. 44 44 05 • Fax 44 46 29